# Bakstur úr Sørvági til Havnar



*Alis Simonsen letur nýggjan handil upp í eysturbýnum mánadagin. Hon fer millum annað at selja bakstur úr Sørvági*
*Mynd: Jens K. Vang*

**Mánamorgunin letur nýggjur handil upp í eysturbýnum í Havn, har sum Eysturbúðin fyrr var. Í handlinum »Hjá okkum« fara tey millum annað at selja bakaravørur úr Sørvági**

HANDIL
*Edvard Joensen*

**Tórshavn:** Tann bara 19 ára gamla Alis Simonsen letur mánamorgunin upp egnan handil í eysturbýnum í Havn. Hon fer millum annað at selja bakaravørur úr Sørvági í handlinum.

Hon er ikki heilt ókend við hetta at standa í handli, so tað er neyvan av ongum, hon hevur valt sær handilsvinnuna sum yrkisleið.

Foreldrini hava stóran handil í Sørvági, har pápin eisini er bakari, so tað var soleiðis meira ella minni sjálvsagt, at Alis fór á handilsskúla. Hon gongur í løtuni á hægri handilsskúla í Havn, fyri á tann hátt at fáa sær allan tann kunnleika, sum krevst til at reka handil.

Hugflognum bilar heldur einki, og hon er ikki bangin fyri at fara undir heilt nýggjar royndir, soleiðis. Hon fer nevniliga at flyta allar bakaravørur, sum hon fer at selja í handlinum, úr bakarínum hjá pápanum í Sørvági.

## Baka í Sørvági

Hvønn morgun, tá handilin á horninum á Dj. í Geilsgøtu og Bókbindaragøtu letur upp, verður tað við nýbakaðum breyði, køkum og wienerbreyði frá bakaranum í Sørvági.

Alt verður flutt til Havnar um morgunin. Um Vestmannasund við fyrstu rutu, so klárt er, tá upp verður latið í Havn.

Fyrstu tíðina verður tað bara í vanligari handilstíð, at bakaravørurnar kunnu keypast. Men tá undirsjóvartunnilin er komin, fer at bera til at keypa nýbakað í eysturbýnum upp aftur fyrr á morgni. Tá fer handilin at hava egna bakaradeild burturav, sum fer at hava opið heilt tiðliga. Tí tá ber til at fara á hálvari nátt, um tað skal vera, úr Sørvági.

Handilin, sum Alis Simonsen fer at lata upp mánamorgunin, eitur »Hjá okkum« og heldur til í somu hølum í eysturbýnum í Havn, sum Eysturbúðin fyrr var í.

Síðan Eysturbúðin lat aftur, hevur eingin handil verið í umráðnum, har rættiliga fitt av fólki býr.

Og grannunum dámar væl, at handil aftur verður í umhvørvinum. Onkur hevur beinleiðis vent sær til Alis og fegnast um, at hon letur uppaftur.

At tey so eisini fáa »bakarí« í grannalagið, munnu fleiri helst fegnast um eisini. Tey minnast ivaleyst aftur á gomlu dagarnar, tá tey plagdu at vitja inn á gólvið hjá Alla at keypa sær morgunbreyð ella annan bakstur.

Hugskotið til at fara undir at handla í Havn fekk Alis einaferð í fjør, og tá so Eysturbúðin stóð tóm, gjørdi hon av at royna seg har.

Hon hevur broytt allan handilin, so hann í dag er sum nýggjur. Og hon hevur staðið fyri allari innrættingini sjálv.

Hon ivast ikki í, at tað fer at bera til at flyta bakaravørur heilt úr Sørvági til Havnar at selja.

Hóast einir fýra bakarar eru í Havn, metir hon, at marknaðurin er ríkiligur til ein handil afturat við bakaravørum. Um tær so verða fluttar úr Sørvági, metir hon ikki fara at dýrka tær so mikið, at tær ikki kortini vera kappingarførar við tað, hinir bakararnir í Havnini selja.

## Bíligari í Vágum

Bakarin i Sørvági, sum fer at baka fyri nýggja handilin í eysturbýnum, ivast heldur ikki í, at tað fer at bera til at baka í Sørvági og flyta vøruna til Havnar fyri síðan at selja við vinningi.

Hann vísir á, at hansara bakstur er bíligari enn hjá flestu bakarum í landinum. Eitt nú helt hann gamla prísin, tá flest allir bakarar i landinum hækkau breyðprísin herfyri.

Og hann er onga løtu i iva um, at hann nokk skal klára at røkja flutningin til Havnar soleiðis, at nýbakað altíð fæst á morgni.

Nú fer at vára, og í summar verður eingin trupulleiki við sigling um Vestmannasund, sigur hann. Tá so veturin kemur aftur, verður koyrandi undir sundinum, og tá er als eingin forðing at koma til Havnar.

Hann bakar alt, sigur Valdemar Simonsen, bakari. Vanlig breyð eins og konditraravørur. So úrvalinum bilar einki.

Tað, sum sørvingar halda vera gott, man havnarfólki eisini fara at dáma, heldur bakarin, sum fegnast um samstarvið, sum komið er i lag, og gleðir seg til at sleppa at víðka søluna.

– Tað ber ikki til bara at sita og bíða eftir møguleikunum. Ein má eisini taka teir, tá teir eru har. Og nú undirsjóvartunnilin kemur, sá eg tað sum ein góðan møguleika at víðka søluna, sigur bakarin í Sørvági.








# Lívið er, sum tað verður givið einum

**Mánadagin hava hjún í Vági ein merkisdag. Tey hava verið gift i heili 65 ár og kunnu tískil halda krúndiamantbrúdleyp**



*Mánadagin hava Herborg og Torkil Strøm í Vági ein merkisdag, sum tað er fáum beskorið at røkka. Tá hava tey verið gift í heili 65 ár og kunnu halda krúndiamantbrúdleyp*

MERKISDAGUR
*Áki Bertholdsen*

– Lívið er, sum tað verður givið einum. Og vit hava havt eitt ríkt lív.

Hjúnini Herborg og Torkil Strøm í Vági, hava ein merkisdag mánadagin. Tá hava tey nevniliga verið gift í heili 65 ár og kunnu sostatt halda krúndiamantbrúdleyp og tað er ikki øllum beskorið, verri enn so.

Tey bæði vórðu gift í Vágs Kirkju 18. februar í 1937, tað var í gomlu kirkjuni í Vági í teimum døgum, tá ið hon stóð á Kirkjukletti. Tá var Bang Jensen prestur í Vági.

Og nú 88 ára gamli Torkil og 84 ára gamla Herborg halda hendan stóra dagin mánadagin saman við næstringum sínum, eru tað eini eydnusom og væl nøgd hjún, sum líta aftur um bak.

– Vit hava havt eitt gott lív, spard fyri mótrburð og sorgir av týdningi og ongantíð verið arbeiðsleys og tað er nógv at vera takksom fyri eftir eitt langt lív.

Herborg var fødd 11.juni 1917 í Øravík, hon var dóttir Jóan Petur Mortensen og Hansinu f. Hansen úr Tórshavn. Tey búðu í Mýruni í Øravík og har vaks mamma upp. Hon var tann sjeynda í røðini av tíggju systkum.

Torkil er føddur í Vági 28. juli 1913. Foreldur hansara vóru Niels Petur Strøm, timburmeistari og Maria f. Hjelm, hann var frá Kráir og hon av Løðhamri og har vaks hann upp sum miðlingabeiggi ímillum ein eldri bróður og eina yngri systir.

Torkil var timburmaður og smíðaði í nógv ár, bæði í Grønlandi, har hann var við til at gera sjómansheimið í Føroyingahavnini í 1937 og eftir kríggið, eisini í Íslandi.

Men mest hevur hann arbeitt heima. Bæði sum timburmaður, men hann koyrdi eisini lastbil, eitt nú koyrdi hann í eitt áramál oljubil fyri Esso, sum seinni varð til Statoil.

– Fyrsta lastbilin keypti eg í 1947. Tað var ein Bedford minnist Torkil.

Hann sigur, at tá á døgum skuldi ein hava loyvi frá kommununi fyri at kunna keypa lastbil og bilar, sum tóku meir enn 1,5 tons, varð ikki loyvi at keypa.

– Í dag eru taka bilarnir 40-50 tons, men vegirnir eru at kalla teir somu, bara við asfalti omaná….

Herborg hevur eisini arbeitt. Hon hevði egið virki, sum als ikki var vanligt hjá konufólki tá á døgum. Hon hevði vaskarí, har hon vaskaði fyri fólk úr allari oynni.

Men tá ið hvør hús fekk vaskimaskinu, fór tað arbeiðið at minka, tó at tað enn var nógv at gera, tí enn var sumt, sum fólk helst vildu sleppa undan at vaska sjálvi.

Herborg og Torkil eiga fimm børn: Tórgir, ið býr í Porkeri, Maritu og Jonhild, ið búgva niðri, Hans Paula, ið býr í Vestmanna og Mariu, ið býr í Havn.

Av frítíðarítrivum hevur hevur sangurin verið frammaliga, tí bæði havatey sungið í kirkjukórinum, Ljómi, í nógv ár.

Annars hevur Torkil mála og mangar eru tær stovur, sum er prýdd við onkrari av hansara myndum.

Tað vóru landsløg hann málaði og evnini til góðar myndir tróta ikki í Suðuroynni, sigur hann: Og hóast komin upp í árini, trívir hann enn í pensilin av av á.

# Lívið verður gráari nú Karl er farin

**Formaðurin í Havnar Arbeiðsmannafelag var ein maður, sum gav tilveruni lit, sigur størsti arbeiðsgevari í Havn poul Mohr, ið hevði mangan dystin við Karl Johansen**



*Karl Johansen var fakfelagsmaður við sínumegnu meiningum, men hann var als ikki einoygdur, sigur størsti privati arbeiðsgevari í Havn, Poul Mohr, sum mangan hevur sitið yvirav Karl í samráðingum*

EFTIRMÆLI
*Áki bertholdsen*

– Tað eru teir bestu, ið doyggja.

Tað er eftirmælið, ið Karl Johansen fær frá størsta arbeiðsgevaranum í Havn, Poul Mohr, stjóra á Tórshavnar Skipasmiðju.

Karl Johansen, sum var formaður í Havnar Arbeiðsmannafelag og Poul Mohr, sum var formaður í Havnar Arbeiðsgevarafelag í ein lítlan mansaldur, hava havt nógvar dystir.

– Vit vóru mangan ósamdir, men vit vóru ongantíð óvinir, sigur Poul Mohr, nú Karl liggur undir børu, eftir at hann brádliga doyði seinastu nátt.

– Grieg segði í eini yrking, at "det er de bedste der dør" og tað kunnu vit siga um Karl, sigur Poul Mohr, ið samráddust við Karl í eini 20 ár og tí kennir fakfelagsformannin Karl Johansen betri enn tey allarflestu.

– Karl var ein maður, tú kundi líta á. Hjá honum var eitt orð eitt orð, og tá ið Karl hevði lovað nakað, kundi tú vera vísur í, at lyftið varð hildið og tað er ein góður eginleiki at hava.

Poul Mohr heldur, at Karl Johansen var ein ótrúliga góður fakfelagsformaður.

– Hann var ein fakfelagsformaður, ið hevði sínar egnu meiningar. Men hann var als ikki einoygdur og tað bar altíð til at tosa við hann, tí hann brúkti eisini vit og skil.

Poul Mohr sigur, at tað hevði n´gov at siga, at tað bar til at hava álit á hvørjum øðrum og tí var hann ein ótrúliga góður maður fyri allar partar.

Størsti sigurin hjá karl Johansen, var tá ið Havnar Arbeiðsmannafelag fekk eftirlønargrunn í áttatiárunum.

Hetta er ein grunnur, sum eisini arbeiðsgevarar betala til. Men á hátíðarhaldinum, tá ið Karl hevði verið formaður í Havnar Arbeiðsmannafelag í 25 ár, segði Poul Mohr, at hetta var eitt gjald, sum teir betaltu við gleði.

Karl var litríkur og tað ikki yvir at dylja, at lívið verður gráari, nú Karl hevur lagt árarnar inn, sigur Poul Mohr.